

# Hví samfelagsgransking?


**Dennis Holm**

***23. september 2009***

***Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning***

***www.socdev.fo***

# Um framløguna

**Framløgan er býtt í tveir partar**

**<u>Fyrri parturin</u> er meiri generelt um hugtakið gransking og hví gransking hevur týdning, eisini í Føroyum.**

**<u>Seinni parturin</u> er um føroyska samfelagsgransking og nakrar av granskingarverkætlanunum, sum okur arbeiða við á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning.**

# Hví gransking?

**Hugtakið gransking ofta brúkt sum gandaorð, men hví skulu okur granska í Føroyum?**

*(Og ja, tað eru uttan iva nógv ymisk svar uppá júst hendan spurningin!)*

**Millum svarini er:**

**- at gransking er ein fortreyt fyri at okur í Føroyum kunnu fáa, skilja og brúka vitan uttan úr heimi.**

**- gransking er eisini ein fortreyt fyri at okur kunnu skapa nýggja vitan í Føroyum – t.d. um serføroysk viðurskifti ella nýggja vitan, sum føroyska vinnulívið kann brúka.**

- **føroysk gransking er eisini neyðug fyri at kunna taka lut í altjóða gransking – har er føroyska havgransking er eitt gott dømi.**

*Framhald...*

# Hví gransking? (2)

*...framhald*

**Gransking hevur eisini ávirkan á vitanarstøðið í landinum**

**- tí gransking førir (undir vanligum umstøðum) við sær at fleiri granskarar verða útbúnir**

**- gransking skapar eisini grundarlag undir góðum útbúgvingum og framhaldandi dagføring av hesum útbúgvingum – t.d. á Fróðskaparsetrinum.**

**Hetta eru so nakrar av orsøkunum til at okur skulu granska í Føroyum.**

# Hvat er gransking – nøkur hugtøk

**Gransking er:**

**Sum heild kann sigast, at gransking er gjøllari vísindalig kanning av einum ávísum evni, sum man hevur áhugað í at fáa meiri at vita um.**

**Skapa nýggja vitan**

**Sostatt liggur tað eisini í hugtakinum, at við gransking verður skapt nýggj vitan, sum eisini kann verða nýggj vitan um ella betri forstáilsi fyri hvussu ymisk viðurskifti hanga saman.**

# Hvat er gransking – nøkur hugtøk (2)

**Grund-forskning og anvendt-forskning**

**Vanliga verður skilt millum grundgransking og brúksgransking; ella grund-forskning og anvendt-forskning.**

**(Markið millum grundgransking og brúksgransking er tó ikki altíð so knívskorið.)**

# Hvat er gransking – nøkur hugtøk (3)

**Grund-gransking / grundforskning**

**Grundgransking er gransking, sum hevur til endamáls at skapa ella vinna nýggja vitan uttan at tað verður hugsað so nógv um hvat úrslitini kunnu brúkast til í praksis.**

**Úrslitini av grundgransking eru oftast ætlaði granskingar-umhvørvum.**

**Brúks-gransking / anvendt forskning**

**Brúks-gransking er gransking sum er málrættað ímóti at loysa ávísar trupulleikar, ímóti praktiskum málum ella t.d. skapa nýggj produkt.**

**Úrslitini av brúks-gransking eru oftast ætlaði øðrum enn granskingarumhvørvum.**

# Hví samfelagsgransking?

Generelt er endamálið við samfelagsgransking at skapa nýggja vitan um viðurskifti í samfelagnum - og nýggj og betri forstáilsir fyri hvussu ymisk samfelagslig viðurskifti hanga saman.

Samfelagsgransking spennir víða og fevnir í veruleikanum um alt frá gransking í viðurskiftum innan samfelagsbúskap, politikk og skipan av samfelagnum, og sosiologi (um einstaklingin, bólkar og samfelagið).

# Samfelagsgransking í Føroyum

Samfelagsgransking ikki drúgvar traditiónir.

Tann fyrsti samfelagsfrøðingurin varð settur í starv á Fróðskaparsetrinum í 1989 – og var nokk einasti samfelagsgranskarin í Føroyum í eini 10 ár.

Um árskiftið 1999/2000 varð Granskingardepilin fyri Økismenning stovnaður.

Í dag Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. Tilknýttur til Fróðskaparsetri Føroya.

4 granskarar í fullum starvi og tveir granskarar tilknýttir granskingarverkætlanum

# Gransking á Granskingardeplinum (1)

**Hava arbeitt út frá granskingarætlanum, við ávísum høvuðsevnum.**

**Granskingarætlaninar hava fevnt um eitt ávíst áramál**

**Hava eisini verið partur av altjóða granskingar-verkætlanum.**

**Umframt gjørt umbidnar uppgávur (policy studies).**

# Gransking á Granskingardeplinum (2)

## 1999-2003: Økismenning

- **Endurreisn eftir kreppuna í 1990unum**
*T.d. lýsing av hvussu kreppan ávirkað ávís øki í landinum og hvussu øki megnaðu at koma burturúr kreppuni.*

- **Kommunur og kommunubygnaður**
*T.d. lýsing av kommunala samstarvinum í Sundalagnum*

- **Ungdómur, fiskivinna og útbúgving**
*T.d. størri kanning millum ung, um útbúgving og ynski um starv eftir lokna útbúgving.*

- **Policy studies og umbidnar kanningar**
*T.d. Kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum. Og kann av ynskjum og tørvi á eldraøkinum í Vágum.*

# Gransking á Granskingardeplinum (3)

## 2004-2008: Menning og vinnulívið

\- **Kommunur og menning**
*T.d. kommunur og menningarmøguleikar í smb. við pendling*

\- **Lokal- og økismenning**
*T.d. Vinnulívslýsingar og demografiskar lýsingar*

\- **Fiskivinnan og aðrar vinnur**
*T.d. Kanning millum arbeiðsmegina á flaka- og fiskavirkjum. Høgir oljuprísir og djúpvatnstrolarar. Og ES-verkætlanin PRONE.*

\- **Policy studies og umbidnar kanningar**
*Trivnaðarkanning fyri sjúkrarøktafrøðingar. Kanning av happing í fólkaskúlanum. Kanning av livikorunum hjá fyritíðarpensjónistum.*

# Granskingardepilin i dag (1)

## 2009-2014: Samfelagsmenning – vald og demokrati

- Tilfeingisumsiting

- Vald í samfelagnum

- Samfelagsmenning í smátjóðum

-  Policy studies og aðrar umbidnar kanningar

# Granskingardepilin i dag (2)

**<u>Tilfeingisumsiting</u>**

- **Fiskiveiðuumsiting** (framhald av EU-verkætlan)
- **Humantilfeingi** (t.d. Motivatíonskanning. Føroysk sjófólk í øðrum londum)

**Undirevnir:**
**Fiskivinnu-/fiskiveiðuumsiting, fiskivinnan og atknýttar vinnur; olja og atknýttar vinnur; fiskitilfeingi, oljutilfeingi, human-tilfeingi.**

# Granskingardepilin i dag (3)

**Vald í samfelagnum**

- **vald og kyn** (føroysk og norðurlendsk verkætlan)
- **vald og vælferðarsamfelagið** (føroysk verkætlan)
- **vald og mál** (føroysk og norðurlendsk verkætlan)

**Undirevnir:**
**Vald og klassar í samfelagnum, Vald og vælferðarsamfelagið, Vald og álitssessir, Vald og kyn, Vald og mál, Vald og miðstaðarøkið contra útjaðaran, Vald og viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.**

# Granskingardepilin i dag (4)

**Samfelagsmenning í smátjóðum**

- **Demografiskar lýsingar** (føroyskar verkætlanir + framløga á ráðstevnu í Norra)
- **Lýsingar av vinnulívinum** (føroyskar verkætlanir)
- **Vakstraravtala fyri Suðuroynna** (føroysk verkætlan)

- **Economusee** (altjóða verkætlan; høvuðsfígging frá Northern Periphery Programme, stytt NPP, sum er útjaðaragranskingargrunnur hjá EU)
- **Retailing in Rural Areas** (altjóða verkætlan; høvuðsfígging frá Northern Periphery Programme, stytt NPP, sum er útjaðaragranskingargrunnur hjá EU)

Undirevnir:
Økismenning, vakstraravtalur, útjaðaramenning, kommunalar eindir og menning, microstatir og menning

# Granskingardepilin i dag (5)

## Policy studies og aðrar umbidnar kanningar

- Motivatiónskanning fyri Vinnuhúsið

- Notat/Upprit fyri Kommununevndina

- Kanning fyri Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið

- Trivnaðarkanning fyri Pedagogfelagið

# At enda

Samfelagsgransking er ein týðandi partur í tí at fáa meiri vitan um nógv ymisk samfelagsviðurskifti.

Í stórum pørtum av vesturheiminum spælir samfelagsgransking ein týðandi leiklut í skipanini av samfelagnum.

Samfelagsgransking í Føroyum hevur týdning fyri bæði føroyska samfelagið – og fyri altjóða samfelagsgransking.